## EG MEINI TAÐ

# Tá verðin bankar hart á dyrnar



*Elin Heinesen skrivar*

Tá eg vaks upp í Føroyum í 60'unum og 70'unum uttan sjónvarp - bert við knasandi, spruttandi og ýlandi ljóðinum frá »danskarnum« og »norðmanninum« í útvarpinum - kendist umheimurin rættiliga fjarur. Friðarliga Havnin var heimsins nalvi og her var øll verðin - ja, her var alt mær tørvaði, hvørki meir ella minni.

Ikki fyrr enn eg sum 10 ára gomul búsettist eitt ár í Spanialandi saman við foreldrum mínum, byrjaði eg so smátt at skilja, at verðin veruliga var annað enn Havnin og Sandavágur og Klaksvík, har eg fór at ferðast um sumrarnar. Hetta var í 68-69, at vit fóru til Spania. Árini, har studentarnir gjørdu uppreistur. Vit ferðaðust gjøgnum París, har vit steðgaðu 14 dagar í studentabýnum beint um tað mundið, tá harðast leikaði á í 68, men kortini merktu vit ikki stórt til hesa heimshending, sum seinni bleiv gjørt so nógv burturúr í søgubókunum.

Í Spania var fasistiskt dikatur. Fransisco Franco stýrdi landinum við harðari hond. Eg hugsaði ikki stórt um, at vit so ofta sóu vápnaða løgreglu á gøtunum, og at vit í skúlanum skuldu hava uniform og marsjera sum hermenn. Hvønn morgun, tá vit møttu, skuldu vit standa rætt í longum rekkjum, gera honnør til flaggið og syngja tjóðsangin. Myndin av álvarsama Franco í militerbúnað og stjørnum og ordanum hekk uppiyvir talvuni í skúlastovuni og helt eyga við minstu rørslum okkara. Og vit skuldu nikka virðisliga til myndina, tá vit komu inn og stillaðu okkum við pláss okkara, áðrenn vit settu okkum niður allar ísenn eftir boðum frá lærarinnuni. (Vit vóru bert gentur, tí gentur og dreingir gingu ikki í somu flokkum).

Soleiðis var tað so øðrvísi enn tað, eg kendi til frammanundan. Og øll undraðust, tá eg kom heimaftur og kundi fortelja um tað. Men hóast eg persónliga hevði upplivað eitt sindur av verðini uttanfyri Føroyar, kom verðin ikki serliga nógv nærri at Føroyum. Føroyingar lurtaðu eftir tíðindum í útvarpinum og ristu bara við høvdinum at øllum tí undarliga, sum fyrifórst uttanfyri klettarnar. Men tað rakti teir ikki nakað serligt. Lívið gekk víðari sum vant.

Bert fáar ferðir í mínari livitíð, hevur verðin bankað hart uppá dyrnar hjá okkum í Føroyum. T.d. tá oljukreppan kom mitt í 70'unum. Knappliga skuldu vit í Føroyum eisini spara og ikki koyra bil sunnudagar. Vit føldu knappliga eitt band til onnur har úti í verðini, tí vit livdu somu lagnu sum tey.

Og nú aftur tá tann ræðuliga atsóknin var framd í New York tann 11. september. Eitt satt »wake up call«, sum amerikumenn taka til, sum noyðir okkum øll í vesturheiminum - eisini í Føroyum - at hugsa um, hvat tað er fyri ein verð, vit øll liva í. Hvørji felags virði, vit byggja okkara tilveru á, og hvussu vit skulu verja hesi virði, tí ongantíð fyrr - kanska ikki ein gang undir kalda krígnum - hava vit merkt ein triðja veraldarbardaga anda okkum so ísandi kalt í nakkan. Ongantíð hava vit kent okkum so hótt av einum so óndum ósjónligum fígginda, ið ongan sparir - skuldarleys ella ei - og sum kann raka hvar sum helst. Kanska eisini føroyingar. Hetta er ræðandi.

Nú ræður um ikki at lata ræðsluna mála ov nógvar ræðumyndir, sum seta meira split millum menniskju í heiminum enn grundarlag er fyri. Verðin er ikki knappliga bara vorðin svørt-hvít, bara tí nakrir fáir vitleysir valdsgerðarmenn hava vent alt á høvdið. Hesir skulu fyri alt í verðini finnast og revsast, men vit skulu ikki eisini revsa milliónir av skuldarleysum fólkum, sum tilvildarliga hoyra til somu religión sum teir, tí so eru vit ikki stórt betri enn valdsgerðarmenninir, vit berjast móti.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

Kjak um dagrøktarstovnar:

# Nyttar einki at koyra mammuna heim



Nr. 62 — 13. oktober 1976 sosialurin Síða 7

**Dagrøktar stovnar**

**Spurningurin um barnagarðar og um tørvin á slíkum stovnum hevur ikki verið sørt frammi nú, og vil óivað verða havdur frammi hesa tíðina, ikki minst av tí at kommunuval stendur fyri durum.**

*– Tað er ofta tjak frammi um tað neyðuga í at hava barnagarðar, vøggustovur og eisini skipaða dagrøkt í privatum heimum. Men vit koma neyvan nakran veg til loysn við at siga, at best er at foeldrini hava børn síni heima, og at mamman er heima, skrivaði Sosialurin 13. oktober í 1976. Myndin er tikin í tí tá nýggja Barnagarðinum við Velbastaðvegin*

**Spurningurin um barnagarðar og um tørvin á slíkum stovnum hevur ikki verið sørt frammi nú, og vil óivað verða havdur frammi hesa tíðina, ikki minst av tí, at kommunuval stendur fyri durum, skrivaði Sosialurin 13. oktober 1976**

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI
*Eirikur Lindenskov*

– Serliga eru tær størru kommunurnar ofta kroystar, tá dagrøktarstovnar ikki eru, ella eru í alt ov lítlum tali. Men heilt sørt er ikki gjørt á hesum øki, hóast hesir stovnar bert finnast á stórplássunum – í Klaksvík og í Havn.

Hetta skrivaði Sosialurin mikudagin 13. oktober 1976. Og vit endurgeva greinina:

»Í Klaksvík hevur KFUM og K gjøgnum mong ár rikið ein barnagarð, sum í løtuni stendur fyri víðkan. Í Havn er Drotning Ingridar Barnagarður, »meinheitsbarnagarðurin« eisini kallaður. Hesin barnagarður er bygdur í fimmtiárunum. Harafturat koma barnagarðurin og vøggustovan hjá Franciskanarasystrunum, nunnunum. Síðani er vøggustova í Eysturbýnum, á Lützenstrøð, barnagarðurin við Hoyvíkstjørn, á Íslandsvegnum, umframt vøggustovan og barnagarðurin, sum kommunan hevur stovnað úti á Velbastaðvegnum. Allir hesir stovnar verða riknir við stuðuli frá tí almenna.

Fyri nøkrum árum síðani varð gjørd ein týðandi lógarbroyting fyri at koma tí økta tørvinum at fáa børn í dagpleygu í á møti, sum bæði kann vera eitt lið í arbeiðinum hjá vøggustovu og barnagarði, tá hesir stovnar ikki síggja seg førar fyri at taka ímóti tí tørvi, sum er. Í hesum sambandi kann fáast í lag skipað dagrøkt hjá privatum, somuleiðis sum ein serlig dagrøkt fyri børn hjá privatum kann fáast. Men tað er bara Tórshavnar kommuna, sum hevur gjørt nýtslu av hesi skipan og hevur stovnað eina dagrøkt.

Útreiðslurnar til allar hesar stovnar verða goldnar soleiðis, at staturin ber 40%, kommuan 30% meðan foreldrini gjalda 30% av útreiðslunum. Er talan um ognarútreiðslur, ber staturin 4/7 og kommunan 3/7 av útreiðslunum.

Tað er ofta tjak frammi um tað neyðuga í at hava barnagarðar, vøggustovur og eisini skipaða dagrøkt í privatum heimum. Men vit koma neyvan nakran veg til loysn við at siga, at best er at foreldrini hava børn síni heima, og at mamman er heima.

Í fyrsta lagi tí, at tað ikki er gjørligt hjá øllum. Í øðrum lagi tí, at samfelagið hevur ikki ráð til at hava mammurnar heima, og í triðja lagi er tað í alraflestu førum av stórum týdningi, at børnini sleppa í barnagarð saman við øðrum børnum.

Møguleikarnir at fáa í lag dagrøktarstovnar eru til staðar, og spurningurin er heldur í hvørjum einstøkum føri, um kommunur sum heild hava áhuga fyri at seta hesar stovnar í verk. Frammanundan vóru tað, sum vit eisini hava víst á, bert katólska kirkjan og fólkakirkjan (KFUM og K) sum sóu tørvin og týdningin av barnagørðum, og síðani eru aðrir barnagarðar komnir afturat.« (endurgeving endað)

Soleiðis varð sagt fyri 25 árum síðani, og soleiðis kunnu vit framvegis spyrja, um kommunupolitikarar í veruleikanum vilja nøkta barnaansingartørvin.

Í øllum førum er hetta ikki víst í verki í Tórshavnar kommunu seinastu fjórðingsøldina…



# Síðsti arbeiðarin í Havn

**Í 25 ár hevur Karl Johansen verið formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag. Hann hevur verið limur í felagnum omanfyri fimti ár, og hann hevur arbeitt alt sítt lív. Hann ásannar, at øgiligar broytingar eru farnar fram í hansara tíð. Nú tekur hann ein dag í senn**




*- Fyrr vóru allir at kalla arbeiðsmenn, men soleiðis er ikki longur. Nú er alt spesialarbeiði. Effektiviteturin hevur minkað um arbeiðsfólkið, sigur Karl Johansen.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*

Nógv kenna hann. Kanska so frætt sum heilt nógv kenna hann. Hann eitur Karl Johansen. Nógv kenna kanska sum bilførara, onnur sum fakfelagsmann, nøkur sum bæði fakfelagsmann og bilførara, og uppaftur onnur kenna hann kanska sum mannin, sum plagar at halda røðu 1. mai.

Hann er so heilt vist nakað fyri seg. Hann er bæði havnamaðir og arbeiðsmaðir, og hevur hann á sín sermerkta hátt sett sín heldur serstaka brodd á fakfelagsvirksemi her á landi. Hann hevur nú í mong ár verið mótparturin hjá arbeisgevarunum í stríðnum um betri løn. Millum ár og dag hevur hann eisini fingið rættiliga nógv omanyvir seg av málsligum ábreiðslum, men enn situr hann tryggur á ovastu rók innan arbeiðsmannafelagið í høvuðsstaðnum.

### Broytingarnar

Eftir at hava baksast eitt sindur í telefonini, so sita vit henda dagin yvirav Karl Johansen í stovuni hjá honum í Vørðsluni í Havn. Formansvillain er kjallarin av einum sethúsum, sum eru undir umbyggjan. Meðan vit sita og práta verður rokast óført á ovaru hæddini, men hetta er eftir øllum at døma nakað, Karl er vanur við. Vit sessast, og prátið byrjar.

Komandi ár verður Karl 67 ár, so tað eru umleið nakað tað sama av árum síðani hann varð føddur.

- Eg gjørdist limur í Havnar Arbeiðsmannafelag umleið 1949. Síðani tá havi eg verið vekk av og á, men eg havi so at siga verið limur líka síðani 1949, sigur Karl.

Heimurin var heldur ikki heilt tann sami, tá núverandi fakfelagsleiðarin byrjaði sína yrkisleið innan fakfelagið, ið hann seinni skuldi vísa seg at gerast ímyndin av.

Karl minnist, at eitt nú arbeiðsmenn á kaiini í Havn høvdu tað sera strævið.

- Teir skuldu draga ein tungan vogn við jarnhjólum, bara tveir mans, sigur Karl.

Hann sigur eisini, at tað er rættiliga stórar og umfatandi broytingar, sum eru farnar fram á júst hesum økinum. Hann vísir á, at tað í dag er tørvur á einum brotparti av monnunum, sum var tørvur á fyrr, og arbeiðið verður eisini gjørt nógv skjótari.

- Tá í tíðini vóru allir at kalla arbeiðsmenn, men soleiðis er ikki longur. Nú er alt spesialarbeiði. Hetta merkir eisini, at eitt nú Havnar Arbeiðsmannafelag hevur nógv færri limir í dag enn fyri 50 árum síðani, kanska helvtina so nógvar. Effektiviteturin hevur minkað um arbeiðsfólkið, sigur Karl.

Hálvtrýssini eru eitt tað rokmiklasta tíðarskeiðið í Føroya søgu. Karl minnist eisini drúgva verkfallið í 1951. - Tíðin beint eftir verkfallið var ikki nøkur glasilig tíð. Hungur og hall vóru at merkja um alt landið. Tað var ikki fyrr enn at føroyingar fingu møguleikan at leita sær til Íslands, til fiskiskap.

So við og við gjørdist støðan betri, og arbeiðsumstøðurnar fyri verkamenninar gjørdust eisini alsamt betri.

### Formaður

Tá hetta árið er runnið, hevur Karl verið formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag í 25 ár. Tað var heldur ikki uttan eitt sindur av roki, at Karl fyrst fekk pláss í nevndini og síðani sæti á ovastu rók innan Havnar Arbeiðsmannafelag.

Fimmogtjúgu ár er eisini rættiliga long tíð. Hesi árini hava tað eisini verið nakrir, ið hava roynt at troðkað Karl av ovastu rók, men hetta hevur ikki eydnast higartil.

Tann tíðin, Karl hevur verið formaður, er sjálvandi eisini nógvar og umfatandi broytingar farnar fram. Tað sokallaða vælferðarsamfelagið er eisini útbygt í rættiligan stóran mun, og verkamaðurin er heldur ikki hin sami í dag sum tá.

Henda dagin vit hitta Karl, er hann eisini eitt sindur errin yvir at hava sitið hesi góðu mongu ár sum formaður.

- Tað er ikki lætt at vera formaður. Beinanvegin tá okkurt gongur galið, so er tað tú sum hevur skyldina, veit Karl Johansen at siga.

Tað var eisini longu í 1976, at teir byrjaðu at tosa um at gera eina pensjónsskipan. Hetta var í veruleikanum nakað heilt nýtt. Frá byrjan var eisini Føroya Arbeiðarafelag við í ætlanunum, men endin gjørdist, at Havnar Arbeiðsmannafelag og Karl settu á stovn egnan eftirlønargrunn.

Tað var Marius Thomasen, fyrrverandi stjóri á Tryggingarsambandinum, sum hjálpti Arbeiðsmannafelagnum við at gera ein eftirlønargrunn. Hann fær eisini rós frá Karli fyri at hava gjørt eitt sera dygdargott arbeiði.

- Tá var heldur eingin lóggáva á økinum tá grunnurin byrjaði at virka í 1981. Tað var Pauli Ellefsen, sum í sínari tíð góðkendi skipanina, sigur Karl.

Tað er annars ikki tað nógva, sum Karl veit at siga okkum um síni mongu ár á trónini í Havnar Arbeiðsmannafelag. Sáttmálasamráðingar og stríð hava eyðkent hansara tíð sum formaður.

Sjálvur hevur hann starvast 38 ár hjá Balslev, og hetta er eitt tekin um, at honum dámar at vera har uppi.

- Nú taki eg ein dag í senn, og eg veit ikki, hvussu leingi eg fari at arbeiða ella hvussu leingi eg fari at vera formaður, sigur Karl Johansen at enda.